TILTØK

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Fríggjakvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti v/ Jaspur Langgaard
Sunnukvøldið kl. 17.30 bønarløta
Sunnukvøldið kl. 18.00 møti.

»Tíð til Gud«
Úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Evni: Eg, hini og Satan! Aftaná er drekkamuður. Verið hjartaliga vælkomin.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20 húsmøti hjá Mariann og Jákup Eli Jacobsen, Ovaragøta 66, Havn.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli, Høgni Johannesen talar. Øll eru vælkomin.

Adventkirkjan
Fríggjadagin kl. 19.30 dópsgudstænasta.
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Hoyrið hetta orðið. Kl. 11.00 Gudstænasta J. V. Danielsen.

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Bergur í Garði.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Michal Bienkowski í Mariukirkjuni.
Meinigheitskvøld verður mánakvøldið 29. okt. kl. 19.30 við pastor Michal Bienowski, ið talar um »Einglar«. Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, kl. 21.00 Útimøti.
Mánakv. kl. 20.00 Bønarløta.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Filadelfia
Landavegur 22
Í kvøld kl. 21 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 9.30 temadagur fyri hjún v/ Símun Absalonsen, kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Kvøldmøti v/ Rúna Rasmussen.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Fríggjadagin kl. 20.00 í KFUM: Opið hús fyri ung.

Unitum, Kollafjørður
Í morgin kl. 19.00 útimøti í Hósvík.
Sunnudagin kl. 18.30-21.15 Alpha-skeið í Kollafirði.

Saron, Vestmanna
Hósdagin kl. 19.00 Frítíðararbeiði.
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti við Cabin og Dana úr Rumenien.
Mánadagin kl. 20.00 Bíbil- og bønarmøti.
Tlf. andaktin 424741.

Missiónsvika í Funningi
Fríggjadagin kl. 17.00 Barnamøti við Nils Jacob Nilsen, kl. 20.00 talar Torleif Johannesen. Menn av Strondum syngja.
Leygardagin kl. 17.00 Barnamøti við Nils Jacob Nilsen. Kl. 20.00 talar Marius Jacobsen, Leila Højgaard syngur.

Gjógv
Emil Olsen prestur, heldur fyrilestur í Gjáar samkomuhúsi sunnukvøldið kl. 19.00. Evni: Missión, kirkja og embæti.

Barnakonsert
Sunnudagin 28. okt. verður barnakonsert í Ítróttarhøllini í Runavík. Á skránni verður: Vit eru glað, barnakór, sangbólkur, drama, dukkur og felagssangur. Atgongumerki á kr. 30,00 fáast við dyrnar.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Alice Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17 Familjumøti í ítróttarhøllini á Skála. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Ørkin, Saltangará
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará. Páll og Gudna Midjord luttaka við sangi og talu.
Húsmøti verður týsdagin kl. 19.00 í Syðrugøtu hjá Sólbjørg Joensen.

Lívins Orð
Barnamøti verður í dag kl. 17.15.
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við Dávid Bech.
Mánadagin kl. 17.00 møta Liljurnar og ungdómsbólkurin kl. 20.30.

Soli Deo Gloria
Mikudagin kl. 6 Bøn. Kl. 20 Kvinnurnar samlast.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Opel Door's.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

Aglow, Norðurstreymoy
Hugnaligur Aglow fundur verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið kl. 20 har Nancy McDaniel tosar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Sands Missiónshús
Sunnudagsskúlin er nú kl. 14.30. Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið, Tvøroyri
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Árna og Ásbjørg. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur.

Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Sumba
Sunnudagin kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20.00 møti í Sumba.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Møti í Fjallbrúður kl. 18.00, Major Knut Gamst talar.
Mánadagin kl. 20.00 Heimaforbundið, Turid Gamst talar.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 311391/0045 22408269.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Týsdagin 23. okt.:
kl. 10.00–12.00: Vit baka
kl. 10.00–11.30: Sangur - Eyðun Sørensen
Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: Frásøgn um Restorff ættina - Johann Restorff Jacobsen
Mikudagin 24. okt.:
kl. 10.00–12.00: Matgerð
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00: Vit vitja bátasvnið og viðarlundina í Leirvík. 100 kr. gjaldast frammanundan
Hósdagin 25. okt.:
kl. 10.30–11.00: Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00–17.00: Telduprát - Brandur Petersen
Fríggjadagin 26. okt.:
kl. 10.00–17.00: Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00–21.00 og 22.30-23.30.

AA-fundir í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Al-anon
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF
Íslandsvegur 10C 100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C 100 Tórshavn Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Javni
Hoydalsvegur 40 3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14. Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

95 ÁR

Leygardagin 27. oktober verður Thomasia Niclasen, Hvalba, 95 ár. Hon er at hitta í eldra sambýlinum í Hvalba frá kl. 12.00 til 16.00.

BRÚDLEYP

Leygardagin 27. okt. kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Birita Petersen og Heðin Poulsen, bæði úr Havn.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063 110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

Føroyskt møti
verður nú sunnukvøldið tann 28. okt. kl. 18.00 í missiónshúsinum í Hirtshals, Vestergade 13, við Hera Eltør, Aulum. Kaffiborð aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Kristnastova
Birmavej 36, København S,
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail: kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Føroyskt møti í Álborg
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa: postur@faroehouse.dk
Heimasíðan: www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, felagini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Mótasýning og hugnakvøld í SMS

Mikukvøldið skipaði SMS fyri mótasýning og hugnakvøldið á torginum í SMS. Pallur var uppstillaður til mótasýnararnar og runt um pallin vóru borð við stólum uppsett

UNDIRHALD
Orð: Ingrid Bjarnastein
Mynd: Jens K. Vang

Skjótt kom til sjóndar, at alt ov fáir stólar og borð vóru uppstillað. 15 minuttir áðrenn tiltakið skuldi byrja, varð alt fullsett, so vaktirnar í SMS vórðu noyddar at fara inn í Perluna eftir meira stólum.

Fólk sótu við borðini og tóktust at hugna sær sum frægast. Tá klokkan varð 19.40 kom Malan Eyðunsdóttir við guitarspælaranum Jóhan Ziskason á pallin. Malan og Jóhan spældu og sungu í lítlan hálvan tíma til frásøgumaðurin kom á pallin.

Frásøgumaðurin bjóðaði vælkomin og bjóðaði áskoðarunum at fáa sær kaffi og annað gott frá borðunum, sum vóru stillað á hvør sínari síðu av pallinum. Tónleikur varð spældur, og fólk fingu sær okkurt at leska sær við inntil mótasýningin byrjaði 10 minuttir seinni.

Klæðini, ið vórðu sýnd fram, vóru heilt týðiliga merkt av, at jólaborðhaldini eru við at nærkast. Frásøgumaðurin legði eisini dent á, at mótasýningin varð ætlað sum ein klæðnaðarblástur, sum handlarnir í SMS eru við til at skapa.

Mótasýningin varð skipað í tveimum pørtum. Í fyrra parti vístu nakrir av klæðnahandlunum í SMS fram klæðir. Tað var ógvuliga positivt at síggja, at mótasýningin gekk skjótt og væl fyri seg. Modellini gingu einaferð á pallinum, og so útaftur.

Í steðginum millum mótasýningarnar kom Georg S. Petersen ílatin sum konufólk við navninum Charlotte Gertrud. Charlotte Gertrud var so beinasom at greiða áskoðarunum frá brúdleypi sínum, sum bæði var skemtiligt og áhugavert.

Eftir steðgin var fyrsti handil á pallinum Demmus. Demmus hevði latið modellini í svartar skrelliposar, so fokus kundi setast á skógvarnar og ikki klæðini. Kanska hetta hevur havt eitt slag av dupultari ávirkan, tí fólkini tyktust minst líka uppstikin av skrelliposunum, sum av skónum.

Litirnir tóktust at vera afturgangandi: grátt, brúnt, svart fyri tað mesta. Ikki fyrr enn Mango kom á pallin fingu klæðini veruliga lit. Har vóru dreingir í sprøklutum buksum og gentur í indiskum kjólum. Hetta vóru fínir kjólar, men tó ikki so væl hóskandi til tað føroyska veðurlagið.

Tiltakið tók umleið hálvan annan tíma, og sigast kann, at sum heild var tað væl eydnað.

Georg S. Petersen undirhelt